Álit

í

løgtingsmáli nr. 161/2009: Uppskot til løgtingslóg um einkarætt til at byggja, reka og fíggja undirsjóvartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð

Landsstýrið hevur lagt málið fram tann 6. mars 2010, og eftir 1. viðgerð tann 19. mars 2010 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 24. og 31. mars og tann 7. 12. 19. 23. og 28 apríl og tann 5. og 7. mai 2010.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við P/F Skálafjarðatunnilin, Føroya Banka, EIK, Nes-, Runavíkar og Sjóvar kommunu, Tórshavnar kommunu, Kappingarráðið, Landsbanka Føroya, Hermann Oskarsson, Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann í fíggjarmálum, Landsverk og Anniku Olsen, landsstýrismann í innlendismálum.

Undir viðgerðini hevur nevndin fingið útflýggjað viðkomandi skjøl frá Tórshavnar Kommunu, Hermann Oskarssyni, Innlendismálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Klaksvíkar kommunu, roknskap fyri 2008 hjá P/F Skálafjarðartunlinum, umframt risikoanalysu frá Rambøl.

Umframt hesi skjøl, hevur Rættarnevndin fingið svar frá Innlendismálaráðnum upp á spurningar, settar av Umsiting tingsins og Rættarnevndini.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Viðmerkingar

Meirilutin (Alfred Olsen, Anfinn Kallsberg, Rodmundur Nielsen, Hans Pauli Strøm og John Johannessen) hevur hesar viðmerkingar:
Allir partar, ið hava verið inni í nevndini, eru samdir um, at hetta er eitt gott prosjekt, og taka undir við, at Skálafjarðartunnilin verður gjørdur, og hava víst á, at hetta er eitt samfelags-, búskaparligt-, og umhvørvisgagnligt prosjekt, sum eigur at vera framt.

Harumframt vísir tað rúgvismikla skjalatilfarið í málinum, at hetta er eitt ferðslu- og trygdargott prosjekt.

Nevndin hevur undir viðgerðini gjørt sær ómak við at viðgera allar greinarnar og allar ivaspurningar sum settir vórðu, tá málið var til 1. viðgerð í Løgtinginum.

Millum annað, hví prosjektið, sum er størsta íløga í Føroyum til dagin í dag, ikki er bjóðað út og hevur fingið at vita, at orsøkirnar millum aðrar eru hesar:

At ein løgtingssamtykt fyriligggur í løgtingsmálið nr. 79/2006, sum sigur, "at landsstýrismaðurin fer undir samráðingar við privat felag (P/F Skálafjarðartunnilin) um at gera fast samband millum Skálafjørðin og Suðurstreymoy og fast samband um Skálafjørðin og samsvarandi hesum leggur fram løgtingslógaruppskot, sum neyvari ásetir treytirnar".

At, tá verandi samgonga varð skipa, bleiv sett í samgonguskjalið, “at farið verður undir samráðingar við privata felagið um gerð av Skálafjarðartunlinum”.

At í ES eru reglurnar soleiðis háttaðar, at ein slík verkætlan helst hevði verið boðin út, men tær reglurnar eru ikki galdandi í Føroyum, og tí hava Føroyar møguleika at velja at bjóða arbeiðið út, ella lata vera við at bjóða arbeiðið út, og tað er tann loysnin, sum samgongan hevur valt.

Men at tað verður sett í avtaluna millum Innlendismálaráðið og Skálafjarðartunnilin, at arbeiðini uppá at gera tunnilin skulu bjóðast út.

Nevndin hevur viðgjørt spurningin, um P/F Skálafjarðartunnilin er eitt nóg sterkt felag til at kunna átaka sær hesa risastóru verkætlanina, og hevur staðfest:

At tað ber ikki til at meta um styrkina í felagi, sum tað sær út í dag, fyri at kunna meta um, hvør styrkin í felagnum er, tá teir fara undir prosjektið, men tað er givið, at felagið má hava bæði førleika og styrki, fyri at íleggjarar og lánsveitarar vilja lata tí fígging til prosjektið. (sí skjal nr. 7, upprit frá Deloitte).

Ein partur av arbeiðinum í nevndini, sum hevur verið nógv umrøddur er, hví tað ikki er tað almenna sum gerð henda tunnilin, men eitt privat felag. Hetta hevur verið viðgjørt nágreiniliga saman við serfrøðini, ið hevur verið inni í nevndini. Serfrøðin hevur víst á fyrimunir og vansar, við at tað almenna ger tunnilin.

Men við atlitið til, at tað almenna hevur ein góðan ferðsluveg millum Havnina og Eysturoynna og við atliti til møguligan váða við at lata landskassan fíggja hesa stóru íløguna upp á 1 milliard, tá vit hugsa um tey stóru hall á fíggjarlógini komandi árini, sum landskassin skal lánsfíggja, umframt aðrar stórar íløgur t.d. “Sandoyartunnilin” “skúladepilin við Marknagil” og tunnil “Norð um Fjall”, er tað rættast, at hetta projektið er á privatum hondum, leyst frá landskassanum.

Skálafjarðartunnilin er jú eitt privat prosjekt 100% og skal eisini vera tað, soleiðis at landskassin er púra fríður frá øllum váða, og talan er ikki um nakað slag av veðhaldi, men at tunnilin verður latin tí almenna, tá hann er fult afturgoldin um eini 25-30 ár.

Nevndin hevur eisini viðgjørt verkætlanir í heildarætlanini 2008-2020 hjá Landsverki sum umfata vegir v.m. bæði suðuri í Havn og inni í Eysturoynni, men hevur fingið greitt at vita frá Innlendismálaráðnum, at hesar ikki eru ella skullu vera partur av Skálafjarðartunlinum.

Tí prosjektið umfatar undirsjóvartunlarnar, rundkoyringina og íbindingarnar í landsvegin í Runavík, íbindingina í landsvegin á Strondum og íbinding í landsvegin á Sundi og í landsvegin suður móti Sandvíkarhjalla. Har rundkoyring verður gjørd sum íbinding í landsvegin, berð felagið kostnaðin av rundkoyringunum, men rundkoyringin verður alíkavæl ein partur av landsvegnum.

Vegaloysnir og útbyggingar av undirstøðukervinum í Tórshavn og við Skálafjørðin, hevur Landsverk gjørt í samráð við kommunurnar, og eru tær í samsvari við galdandi býarskipanir hjá kommununum, og Innlendismálaráðið legði dent á, at hesar vegaætlanir als ikki eru partur av Skálafjarðartunnils prosjektinum.

Hesar vegaverkætlanir eru at síggja í Samferðsluætlanini hjá Landsverki fyri 2008-2020 og har framgongur eisini, hvør kostnaðurin av teimum er.

Nevndin hevur eisini viðgjørt spurningin um tey fíggjarligu viðurskiftini og vinningin hjá P/F Skálafjarðartunlinum og hevur fingið at vita:

At Skálafjarðartunnilin hevur gjørt avtalu við Landsverk um at brúka teirra ferðslumodell til at dagføra verandi ferðslutøl, og í framhaldandi samráðingum skulu partarnir koma fram til eitt avtalað avkast. Í skjali nr. 7 í lógaruppskotinum er t.d. víst á, at verkætlanin fyri skatt helst kann bera 9,3 % í avkasti av samlaðum kapitali og 15% av eginpeningsavkasti.

Við fyrstu viðgerð var spurningur settur við dygdina í sjálvum lógaruppskotinum og hevur nevndin viðgjørt spurningin og spurt um hetta, tí:

Til 1. viðgerð upplýsti løgtingsformaðurin, at málið ikki var løgfrøðiliga eftirkannað sambært § 22 í tingskipanini, men nevndin hevur fingið at vita, at tann løgfrøðiliga eftirkanningin, sum Innlendismálaráðið ger, er samsvarandi "uppriti um eftirkannan av lógaruppskotum" frá 14. desember 2001, og er gjørt í hesum føri, so hetta lógaruppskotið er eftirkannað.

Nevndin hevur viðgjørt spurningin um rundkoyringina, og um trygdin við at hava rundkoyring í tunlinum er í lagi. Nevndin hevur fingið risikoanalysuna frá RAMBØL, sum hevur kannað tunnilin við ella uttan rundkoyring.

Bæði tunnilin við ella uttan rundkoyring er væl undir tí góðkenda fastlagda bruna-risiko-markinum, ið er galdandi fyri slíkar tunlar.

Og sjálvt um bruna-risikoin við óhappi í tunlinum við rundkoyringini er eitt vet hægri, so verður hetta uppviga í tí, at tunnilslongdin er styttri við rundkoyrings-alternativinum. (pk. 2.2.)

Nevndin hevur eisini viðgjørt tær ymisku greinarnar og fingið nágreiniliga at vita frá Innlendismálaráðnum, hvat greinarnar 2, 4, 5, 8, 9, 11, 13 og 15 innihalda, og hevur tikið hetta til eftirtektar.

Meirilutin metir, at Skálafjarðartunnilin kemur at hava ein alstóran týðning fyri tey fólk, sum ferðast frá og til Havnina, umframt eina kolveltandi sparing í tíð, sum bæði arbeiðsfólk og vinnulívið koma at fáa av tunlinum, og fremja eina økta trygd fyri tey, sum ferðast hetta strekkið. Tunnilin vil eisini fremja eina munandi minging í útlátinum av CO2, umframt eitt munandi minni slit á landsvegin á strekkinum Sund-Skipanes, og harvið sparir landi munandi av peningi í viðlíkahaldi. Skálafjarðartunnilin kemur eisini at skapa nógv arbeiðspláss í sjálvum sær, umframt arbeiðspláss á virkjum og smiðjum, og arbeiði til bil- og maskineigarar v.m..

Bæði landið og kommunurnar koma at fáa eina munandi økta skattainntøku av hesum tunnils-arbeiðið í uml. 4 ár, so fíggjarliga kemur henda íløgan upp á 1 milliard at vera ein munandi innløga fyri lands- og kommunukassarnar, sum koma at fáa 100 tals milliónir meira inn í skatti hesi uml. 4 árini.

Meirilutin tekur undir við uppskotinum um Skálafjarðartunnilin og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið við soljóðandi broytingum

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1) Í § 2, stk. 2 verður orðið "november" broytt til "desember"

2) § 4, stk. 3 verður orðað soleiðis: Ásetingarnar í 2. stk. fevna ikki um:
1. Fyribils broytingar í infrakervinum, orsakaðar av vanligum viðlíkahaldi av vegum, tunlum o.l.
2. Útbyggingar av verandi vegakervi so sum breiðkan av vegum v.m.
3. Verkætlanir, sum landsstýri hevur ætlanir um at fremja tey næstu árini.
4. At skipa verður fyri almennum ella privatum ferðasambandi gjøgnum tunnilin.

Serligar viðmerkingar
Til § 2, stk. 2: Broytingin verður gjørd fyri at geva pørtunum betri stundir til at fáa øll viðurskifti upp á pláss.

Til § 4, stk. 3: Ætlanin er ikki, at ein avtala við P/F Skálafjarðartunnilin ella annað felag, skal vera til hindurs fyri eini annars skilagóðari útbygging av samferðslukervinum. At breiðka vegir kann eisini vera at gera tvísporaðar vegir við nógvari ferðslu trísporaðar.
Verkætlanir, sum landsstýrið hevur ætlanir um at fremja tey næstu árini, eru tær, sum nevndar eru í "Samferðsluætlanini 2008-2020".
Í dag er alment ferðasamband við bussi millum Suðurstreymoy og Skálafjørðin. Tá tunnilin er liðugur, verður nýggj farleið gjøgnum tunnilin, og tað skal ikki leggja endurgjaldsskyldu á landskassan, at fólk meira enn frammmanundan fer at koyra við bussi.

Landskassin skuldi haldast uttanfyri.

Hans Pauli Strøm og John Johannessen taka undir við málinum, men hava hesar viðmerkingar:

Tá ið politisk semja varð gjørd um at lata privat partafelag standa fyri at gera Skálafjarðartunnilin vísti Javnaðarflokkurin á, at hetta átti at verið gjørt í almennum útboði. Eftir okkara tykki er tað prinsipielt týdningarmikið, at fleiri fáa høvi at bjóða, so størri trygd verður fyri, at kostnaðurin verður eftir marknaðarligum treytum.

Í hesum sambandi undrast vit eisini á - eins og m.a. Kappingarráðið vísti á fyri nevndini - at partafelagið roknar sær størri avkast av íløguni, enn rímiligt verður hildið, tá vágin eftir øllum at døma er so avmarkaður.

Tað er av størsta týdningi, at eingin ivi verður um, at allar hjáknýttar verkætlanir, so sum íbindingar í almenna vegakervið og broytingar av verandi vegaføringum, verða ábyrgdin hjá privata partafelagnum.

Minnilutin ivast í, hvørt ásetingarnar í lógini eru nóg greiðar í sambandi við tær víðu heimildir, ið lógin gevur landsstýriskvinnuni at gera avtalur við privata partafelagið í sambandi við sáttmálagerðina. Eisini eru fleiri viðurskifti í sambandi við ábyrgd av tilbúgvingini óavklárað. Hartil kemur sum tað týdningarmesta, hvussu landsstýriskvinnan tryggjar, at landið verður hildið uttan váða av allari verkætlanini. Minnilutin heldur tað eisini vera neyðugt, at konsessjónrætturin hjá partafelagnum verður tíðaravmarkaður. Hetta kann gerast í sambandi við sáttmálagerðina.

Fyri at tryggja hetta, mælir minnilutin landsstýriskvinnuni til at skipa ein politiskan fylgibólk at ráðføra seg við í samráðingunum um sáttmálan við privata partafelagið.

Ein minniluti (Heini O. Heinesen) vísir á, at hóast Rættarnevndin hevur haft 8 fundir, og hervið fingið nógvar vælgrundaðar upplýsingar um, hvussu slík arbeiði vanliga verða sett í verk, er støðan ikki broytt frá tí, sum samtykt var 30. apríl 2007 av somu A B C samgongu, tí kunnu vit spyrja „hví brúka dýrabara tíð til slíkt burturspilt nevndararbeiðið“.

Um arbeiðið var sett í verk í 2007, var støðan nógv betri, enn hon er í dag fyri eina ætlan sum hesari. Tað hevði verið lættari at fingið fígging í 2007. Tíðin hevur eisini stóran tídning.
Tað, sum ger hesa ætlan øðrvísi enn onnur prosjektir av hesum slagi, sum eru gjørd í Føroyum áður, er, at henda ætlan kann gjalda seg aftur sjálv. Tað kann tí undra, at meirilutin leggur dent á, at *Skálafjarðartunnilin er jú eitt privat prosjekt 100% og skal eisini vera tað, soleiðis at landskassin er púra fríður frá øllum vága, og talan er ikki um nakað slag av veðhaldi.* Nú kann ein spyrja, hvør tað er, sum letur einkarættin frá sær, hesin rættur er betri en nakað veðhald. Hetta er ikki annað enn ein almenn farleið, sum skal gjaldast aftur av einum stórum parti av Føroya fólki. Vannligt er at siga um tað privata húsarhaldi, at tað er dýrt at vera fátækur, tað er nú eisini dýrt fyri tað almenna ikki at klára at stýra fíggjarpolitikkinum við skili.

Tað hevur verið nógv orðaskifti um bummgjald í sambandi við gjøgnumkoyring av undirsjóvartunlum. Tað var ein kanning gjørd umleið 1987/88 yviri í Noregi. Henda kanning var brúkt í sambandi við, at farast skuldi undir at bora Vágatunnilin í 1988/89
Henda kanning vísti, at tað var bert í einum staði í Føroyum, tað loysti seg at krevja bummgjald, soleiðis at hetta var til rímiligan prís. Tað var á innkoyringarvegnum til Tórshavnar. Henda ferðsla er meira enn 10 falda síðan tá.

Tað er tí greitt, at tað er bert í einum staði, at man kann áseta bummgjald til rímiligan prís, og tað er sum sagt við innkoyringarvegin til Tórshavnar.

Sjálvandi skuldi Skálafjarðartunnils verkætlanin verið bygd og rikin av tí almenna. Minnilutin vísir á § 9, pkt. 5 í lógaruppskotinum frá landsstýrinum *”Landsstýrið hevur í øllum tíðarskeiðum, har einkarætturin er galdandi, rætt til í ávísum varsli at keypa tunnilin samsvarandi ásettum treytum í sáttmálanum um einkarætt”*.

Tá man nú nú hevur avgjørt at lata hesa verkætlan til eitt ávist privatfelag at byggja og reka, kann tað tykjast løgið, at hendan ætlan ikki verður boðin út millum fleiri feløg.

Politikkurin hjá ABC samgonguni er, at tey prosjektini, sum kosta nógvan pening, skulu skattaborgararnir gjalda, meðan tey, sum kunnu geva pening í alla framtíð, vera latin til eitt ávíst privat partafelag at byggja og reka.

Nú terningarnir eru kastaðir longu 30. apríl 2007, dugir minnilutin ikki at síggja, at tað gevur nakra meining ikki at atkvøða fyri, at ætlanin verður framd.

Ein annar minniluti (Bjørt Samuelsen) tekur fult undir við, at undirsjóvartunnil verður gjørdur millum Eysturoynna og Streymoynna. Tunnilin er ein skilagóð íløga, sum fer at skapa vøkstur og hevur góðar fyritreytir fyri at bera seg væl.

Uppskotið, sum atkvøðast skal um, er ikki ein spurningur um at vera fyri ella ímóti Skálafjarðartunlinum, men ein spurningur um, at landið upp á forhond við lóg verður bundið til at gera avtalu við eitt ávíst felag, áðrenn treytirnar fyri avtaluni við felagið eru kendar.

P/f Skálafjarðartunnilin søkti í januar 2007 Vinnumálaráðið um konsessjón at gera tunnil millum Eysturoynna og Streymoynna. Hóast sjálvt hugskotið at gera hendan tunnil er gamalt, so er lítil ivi um, at stigtakararnir til privatu verkætlanina eiga æruna av, at málið aftur kom fram sum ein realistisk verkætlan.

Eigararnir av P/f Skálafjarðatunlinum eru í dag LÍV og EIK grunnurin, og sostatt ikki tær kommunur og einstaklingar, sum upprunaliga tóku stig til verkætlanina.

Løgtingið samtykti í 2007, at landsstýrismaðurin í samferðslumálum skuldi fara undir samráðingar við privat felag og samsvarandi hesum leggja løgtingslógaruppskot fram, sum neyvari ásetir treytirnar. (Eisini tá vísti Tjóðveldi á, at einasta rætta var at bjóða slíka risauppgávu út, skuldi hon gerast av privatum.)

Lógin, sum nú liggur á borðinum, ásetir ikki serliga neyvt treytirnar. Hon gevur felagum rættindi og trygd, og stillar landið í eina sera veika samráðingarstøðu. Samstundis bindur landið seg á ymiskan hátt, soleiðis at felagið fær endurgjald fyri mistar inntøkur. Ei heldur her ber til at kenna avleiðingarnar, tí treytirnar verða at finna í avtaluni, sum landsstýriskvinnan fer at gera við felagið – og sum ikki verður tøk fyrr enn við ársenda. Í nevndarviðgerðini hevur ikki borið til at fáa at vita, hvussu tann avtalan kemur at síggja út.

Í lóginin, sum nú skal lógarfesta einkrarættin hjá partafelagnum hjá LÍV og EIK-grunninum til at gera og reka tunnilin, eru so nógvar óvissur, at um Løgtingið samtykkir hesa lóg, er tað at samanbera við at privatisera ein undirsjóvartunnil við bindi fyri eyguni.

Minnilutin vísir í hesum sambandi til teir 53 spurningarnar, sum Rættarnevndin sendi Innlendismálaráðnum um lógina, umframt spurningarnar, sum løgfrøðin hjá løgtingsumsitingini hevur sett til lógina. Fleiri av hesum spurningum hevur Innlendismálaráðið ikki kunnað svarað greitt. Heldur ikki er tikið støða til avleiddar verkætlanir fyri nærri 200 milliónum krónum. Útbyggingar, sum landið verður at gera, og sum mugu inn í raðfestingarnar hjá landskassanum.

Úbjóðing sjálvsøgd
Ikki minst tí at talan er um eina útbygging, sum ber seg sera væl fíggjarliga, eru í veruleikanum fáar forðingar - aðrar enn politiskar - fyri, at landið sjálvt kann byggja tunnilin. Landið kann læna pengar

til munandi lægri rentu enn privat feløg, tí landið verður mett at hava høgt kredittvirði. Tunnilin kann tí byggjast munandi bíligari í almennum regi. Um landið gjørdi tunnilin, hevði tað verið rætt og rímiligt, at landið keypti neyðugt tilfar, sum privata partafelagið higartil hevur fingið til vega.

Tá landið kortini velur at lata privat átaka sær størstu útbygging í infrakervi okkara nakrantíð, má eitt minsta krav vera, at verkætlanin verður boðin út. Úbjóðing er einasti háttur, landið kann tryggja sær, at undirsjóvartunnilin varð gjørdur við lægst møguligu forrentning av eginogn og bíligastu fígging, soleiðis at landsins borgarar ikki skulu gjalda ein óneyðugan ovurprís.

Tað er eisini ein álvarsom tilsíðusetan av javnbjóðis rættindunum hjá vinnunum at bjóða seg fram til stórarbeiði, landið setir í gongd. Slík mannagongd hevði als ikki komið fyri í londum, vit annars fegin vilja sammeta okkum við – eitt nú okkara grannalondum og ES.

Hvør fær einkarættin?
Hóast P/f Skálafjarðartunnilin hevur gjørt eitt gott fyrireikingararbeiði, er tað ikki haldgóð grundgeving at lata júst hesum felagnum uppgávuna uttan nakra kapping. Løgtingið veit í roynd og veru heldur ikki, hvørjum tað letur einkarættin, tí felagið kann og fer helst at fáa aðrar íleggjarar inn at kapitalisera felagið so skjótt, sum tað hevur fingið avtaluna.

Tað hevur í nevndarviðgerðini ikki heldur borið til at fáa eina meting av, hvørt felagið, sum fær einkarættin, er nóg væl fyri fíggjarliga, fakliga og í mun til fyrisiting av verkætlan av hesi stødd. Bert eitt sterkt felag fær lagalig lán, og megnar at standa fyri so stórari uppgávu sum hesari. Er felagið ikki nóg sterkt, so er tað í sjálvum sær ein forðing fyri, at verkætlanin gerst veruleiki.

Fíggjarligi parturin
Nevndin hevur ikki fingið útrokningar, sum lýsa fíggjarligu viðurskifini kring verkætlanina og eitt nú inntøkur, og hvussu stórt avkast felagið væntandi fer at fáa árliga og yvir 25 – 35 ár. (burtusæð frá leysligum metingum frá Deloitte, sum vísa á møgueika fyri 9,3% í avkasti av samlaðum kapitali og 15% í eginpeningsavkasti).

Útrokningar, sum áður eru gjørdar, vísa, at inntøkurnar frá tunlinum verða væl oman fyri 100 milliónir krónur árliga, at talan verður um milliarda yvirkot yvir 30 ár, og við afturdiskontering til nútíðarvirði fleiri hundrað milliónir. Nevndin hevur fingið at vita, at felagið arbeiðir við at gera nýggjar kostnaðarmetingar og ferðslutøl, men hevur ikki fingið nýggju metingarnar. Men, sum skilst verða hesi tøl frá felagnum partur av grundarlagnum undir avtaluni við landsstýrið.

Í nevndarviðgerðini er komið fram, at tað eigur at verða sett spurnartekin við, hví felagið sambært metingunum hjá Deloitte, sær út til at skula skal hava eitt avkast, sum er munandi hægri enn tað "risikoavkast", sum hevði verið rímiligt. Tess hægri avkast, tess meira skal brúkarin gjalda. Innlendismálaráðið hevur ikki givið nakað greitt svar upp á slíkar spurningar.

Lítil ella stórur vági?
Ein høvuðsgrundgeving at lata privata felagnum verkætlaninia er, at landið sleppur undan stórum váða. Samstundis skal avkastið ásetast samsvarandi tí váða, felagið átekur sær. Men, tað fyriliggur ikki nøkur váðameting, sum nevndin hevur kunnað fyrihildið seg til. Mest sannlíkt er váðin við hesi verkætlan lítil. Eingin privatur hevði viljað sett eina milliard í eina verkætlan, varð hetta ikki mett at vera ein rímiliga trygg íløga. Samstundis fer ein privat fyritøka ikki at seta so nógvar pengar í, eru útlitini fyri rímiliga stórum avkasti ikki rættiliga góð.

At enda vil minnilutin bara vísa á, at landið, við at gera Skálfjarðatunnilin privatan, missir møguleikan at lata hendan tunnilin verða part av framtíðar planlegging av infrakervinum, til dømis í mun til at gera samhaldsfastar skipanir fyri alt okkara infrakervi.

Minnilutin mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, tann 7. mai 2010

Alfred Olsen formaður	John Johannessen næstformaður	Hans Pauli Strøm
Rodmundur Nielsen	Anfinn Kallsberg	Bjørt Samuelsen
	Heini O. Heinesen	